

*Tað var ein skrúðklæddur Hans Jacob Joensen, bispur, sum vígdi kirkjuna, bað vígslubønina og lýsti vælsignilsi*



*Bjarni Bæk, dómpróstur, prædikaði*



*Dómpróstur og flest allir prestar í landinum handaðu bispi heilagu bøkurnar og silvurkerini, sum fingu pláss á altarinum*



*Ung og stásilig, sum ein drotning, brettir hon sær á, meðan hon tignarliga lítur oman yvir býin. Hoyvíkingar hava fingið sína egnu kirkju – hvít og glitrandi, løtt og savnandi. Stór vindeygu kransa toppin, hagar nógv fólk leitaðu sær: "Akkurát sum at vera í Eifeltorninum" lat í einum, og annar kendi tað sum ein viti, sum lýsir í allar ættir. Nýggja kirkjan hevur stevnið sett, og eins og restina av býlinginum, skjýtur hon beint inn í framtíðina. Av sonnum ein hátíðarløta í Hoyvík í sunnudagin*



*Skrúðgongan*



*Pláss var ikki fyri øllum inni í kirkjuni. Eftir vígsluna vórðu øll boðin inn til ábit í skúlanum og til drekkamunn í kirkjukjallaranum*



*Til urgutónarnar frá nýsetta organistinum Oddvør Johansen, sang fjøldin sálmin Fedranna kirkja í Føroya tjóð, sum Gudmund Bruun yrkti í 1937. Eisini vórðu sálmarnir Kirkjan hon er eitt gamalt hús, eftir Grundtvig og J. Dahl, og Nú takki Guði øll, sum Gudmund Bruun týddi, sungnir. Síðsti sálmurin var Boðar tú til allar tjóðir sum Jóannes Patursson yrkti*